# Eyguni og sukursjúka

SUKURSJÚKA
*Tíðindaskriv*

Dagurin í gjár, tann 14. november, er altjóða diabetisdagur, og tá verður gjørt vart við henda dag kring allan heimin. Í ár varð høvuðsdenturin lagdur á eyguni og sukursjúku.

– Missið ikkki sjónina av gáloysni!

Tali á teimum, sum fáa sukursjúku, veksur skjótt. Í 1985 høvdu 30 milliónir fólk í heiminum sukursjúku. Í ár hava í minsta lagi 170 milliónir fólk sukursjúku, og innan ár 2025 hava væntandi 300 milliónir fólk sukursjúku. Tað er ein 10-falding upp á 40 ár, og tey, ið fáa sukursjúku, gerast alsamt yngri, fólk heilt niður í 20-30 ár fáa sukursjúku, typu 2.

WHO hevur viðurkent sukursjúku sum eina av teimum fýra stóru ikki smittandi sjúkum í heiminum. Hinar eru hjartaæðrasjúkur, krabbamein og óleikjandi lungasjúkur.

Hvør er so orsøkin til hesa øking? Fyrst og fremst er ein orsøk tað økta fólkatalið í heiminum, men eisini ósunnur matur, vit viga ov nógv, vit sita og nógv still og royking, eru orsøkir til hesa ógvusligu øking.

Kring allan heim broytast kostvanar og lívsstílur hjá fólki, og økist vandin at fáa sukursjúku skjótt, og harvið eisini vandin fyri teimum lívshættisligu fylgisjúkum, sukm ofta kom aí kjalarvørrinum á sukursjúku.

Ein av fylgisjúkunum, sum fólk við sukursjúku kunnu fáa, er eygnasjúa. 2% av fólki við sukursjúk gerast blind eftir 15 árum, meðan 10% hava trupulleikar við eygunum. Fólk við sukursjúku eiga regluliga at fara til eygnalækna, so tey ikki missa sjólnina av gáloysni.

Í samband við altjóða diabetisdagin skipar Diabetisfelag Føroya fyri almennum fundi á Hotel Hafnia hósdagin 14. november 2002 kl 19:30, har Jógvan Róin, yvirlækni, fer at greiða frá um sukursjúku, og Kaj Wilhelmsen, eygnalækni, fer at greiða frá um eyguni og sukursjúku.







## ALS 10 ár

**Í sambandi við at 10 ár eru liðin, síðani ALS varð sett á stovn, verður skipað fyri almennum 10-ára haldi hósdagin 21. november. Øll eru vælkomin.**

09.00 Morgunmatur
09.15 Stjórin á Arbeiðsloysisskipanini, Elisabeth O. Gaardbo, bjóðar vælkomin
09.20 Forkvinnan í stýrinum, Karin Kjølbro
09.35 Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum, Bjarni Djurholm
09.50 Framløga av føðingardagsútgávu av Skýrák, Annika Wardum Joensen
10.10 Kári Bæk: Duet fyri tvær violinir Sámal Petersen og Jón Festurstein spæla
10.20 Steðgur
10.40 Roknskapur, Ernst Jacobsen, fíggjar- og fyrisitingarleiðari
10.55 Hagtøl v.m., Elisabeth O. Gaardbo, stjóri
11.10 Maður er mans gaman (hugleiðingar yvir 90-árini uppá gott og ilt) Páll Danielsen, sjónleikari, lesur hugleiðingar eftir Oddvør Johansen
11.30 Samfelagsbúskapur og arbeiðsloysi, Herman Oskarsson, búskaparfrøðingur
11.50 Pallborðskjak. Umboð fyri m.a. partarnar á arbeiðsmarknaðinum og politisku myndugleikarnar
12.30 Ábit
Eivør Pálsdóttir syngur

ALS

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551 • als@als.fo • www.als.fo





# White Flag til Føroya

**Punkbólkurin úr Los Angeles skal spæla á tveimum konsertum í Føroyum 13. og 14. desember. Tónleikararnir í bólkin hava eisini tilknýti til bólkar sum REM, Green Jelly og Hole**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Miðskeiðis í desember mánaði fáa føroyingar spennandi vitjan úr USA. Amerikanski punkbólkurin White Flag kemur til Føroya at spæla, og teir fara at hava tvær framførslur her. Enn er ikki greitt, hvar framførslurnar vera.

Manningin í White Flag er Pat Fear, Kim Crimson, Viv Vacuum og Jim Tilgiant, og fyri fyrstu ferð í 16 ár fer bólkurin á eina stóra Europa-ferð. Hetta gera teir í sambandi við 25 ára jubilemumið hjá sær. Umframt konsertirnar í Føroyum fara teir eisini at spæla í millum annað Onglandi, Belgia, Hollandi, Týsklandi, Estlandi, Finnlandi, Svøríki og Danmark.

Pat Fear tók stig til bólkin, og umframt at skriva meginpartin av tónleikinum hjá teimum, hevur hann eisini skrivað tónleik til nøvn sum Sean Lennon, The Bangles, Redd Kross, NOFX The Shaggs og Belindu Carlisle. Eisini kann nevnast, at Kim Crimson spælir saman við REM bæði á fløgu og á konsertum.

Tað er Tónleikasamtakið Grót, sum stendur fyri ferðini til Føroya. Bólkurin sigur í teldubrævið til Grót, at teir gleða seg serliga nógv til at vitja í Føroyum, nú teir koma til Europa at spæla.

# Tað var Marius …



FRAMSÝNING

Í blaðnum í gjár høvdu vit grein um framsýning hjá Mariusi Olsen, listamanni, í Snarskivuni hjá Tórshavnar Býráð.

Í yvirskriftini stóð, at tað var Tórbjørn Olsen, sum sýndi fram, eins og myndin til greinina var av Tórbjørni. Men sum tann gløggi lesarin óivað hevur sæð, so var talan um ein av hinum brøðrum Tórbjørns, sum eisini er listamaður, Marius Olsen.

Framsýningin verður hangandi uppi árið út.

Høvi er at síggja grafisku framsýningina hjá Mariusi, tá ið opið er í snarskivuni, mánadag-fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.






## Nú ert tú skipari

Áður mátti tú passa tær løgir. Tú skuldi duga ferðaætlanina og mátti bíða í longum bilrøðum í Vestmanna ella við Oyrargjógv. Og hóast skiparin á SAM dugdi síni ting, so kendi tú teg ikki altíð tryggan í ringum veðri.

Nú ert tú skipari. Við Vágatunlinum sleppur tú undan bilrøð, ferðaætlan og rulli. Tú ræður fyri, nær tú kemur og fert. Og so er tað so nógv skjótari eisini. Higartil hava fólk sett tveir tímar av til túrin millum Sørvág og Havn. Við undirsjóvartunlinum verður flutningstíðin undir ein tíma. Vágatunnilin letur upp 10. desember.

**Minst til Kubban**

Ferðast tú ofta um Vestmannasund, loysir tað seg at tekna hald, tí tá fært tú 40 % í avsláttri. Tú fært ein kubba at seta í forrútin og kanst koyra ígjøgnum uttan at gjalda hvørja ferð. Kubbin/hald kann teknast umleið 14 dagar, áðrenn vit opna. Lýst verður í bløðunum.

| Prísir | | Prísur[1] | 5 klipp[2] | 20 klipp[3] |
|---|---|---|---|---|
| Akfør | undir 6 m | 250,- | 1.000,- | 3.000,- |
| Akfør | 6 - 12,4 m | 1.440,- | 5.760,- | 17.280,- |
| Akfør | yvir 12,4 m | 2.160,- | 8.640,- | 25.920,- |
| Ferðafólk/ | | ókeypis | | |

Prísur ① er fyri ein túr (báðar vegir) uttan hald
5 klipp ② er um tú teknar teg fyri haldi við 5 túrum.
20 klipp ③ er um tú teknar teg fyri haldi við 20 túrum.

**Gevið gætur prísurin er fyri báðar vegir (fram og aftur)**

Depositum fyri kubban: 300,-

VÁGATUNNILIN

Vágatunnilin pf. · Skansavegur 7 · P.O. Box 1010 · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 350 200 · Fax +298 350 201
www.vagatunnilin.fo